# Stanley í Nólsoy og Skálavík

Stanley Samuelsen framførir tvær solokonsertir í vikuskiftinum. Hesar eru seinastu konsertirnar, áðrenn hann síðan fer at framføra við bólki aftur – seinni í ár á Suðuroynni og í Norðurlandahúsinum. Fríggjakvøldið 1. august klokkan átta er konsert við Stanley Samuelsen í bygdarhúsinum Nólsoy. Leygarkvøldið klokkan hálvgum átta framførir umtókti tónleikarin eisini í Skálavík. Atgongumerki til konsertina leygarkvøldið kunnu fáast í kunningarstovuni.



Í proceduru síni legði Linda Hesselberg stóran dent á, at høvuðsákærdi eftir øllum at døma ólógliga hevði tikið passini hjá órættaðu, og undraðist stórliga á, at løgreglan fann tey í einum plastposa undir eykahjólinum í bilinum hjá ákærda. Eitt undarligt goymistað, helt hon.

Viðvíkjandi drápshóttanunum segði hon, at málið í stóran mun snúði seg um trúvirði, og at órættaðu í nógv størri mun virkaðu trúverdugir. Tað undirbygdu prógv og vitnisfrágreiðingar í málinum segði hon og mælti til, at høvuðsákærdi varð dømdur fongsul í seks mánaðir og medákærdi í tríggjar, umframt at hald varð lagt á ávikavist 12.800 krónur og 135.000 krónur.

Í báðum førum mettu verjarnir ikki, at ákæruvaldið hevði prógvað sínar ákærur, og kravdu tí í fyrsta lagi frídøming. Jógvan Elias Winther Poulsen kravdi í øðrum lagi ein hægsta dóm fyri høvuðsákærda upp á tveir mánaðir, meðan Bjørn á Heygum í øðrum lagi kravdi treytaða fongsulsrevsing.

Dómarin gjørdi av, at høvuðsákærdi skuldi inn at sita í fýra mánaðir, hin ákærda í tveir. Haraftrat skuldi hald leggjast á pengarnar.

Teir báðir ákærdu skutu á staðnum dómin inn fyri landsrættin. Samstundis boðaði ákærin frá, at hon fór at krevja strangari revsing í landsrættinum.

# Óvissa um pengar

**Ákæruvaldið hevur í málinum lagt hald á 135.000 krónur, sum yngri bróðurin hevði við sær í kontantum, tá hann kom til landið 15. juli í ár. Samstundis sigur hesin seg hava sæð órættaðu í Kastrup við hvør sínum kufferti við 200.000 krónum í hvørjum**

DRÁPSHÓTTAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eitt eftir øllum at døma stórt »mysterium« í sakarmálinum móti teimum báðum tunesisku brøðrunum, er ein taska við 135.000 krónum í kontantum, sum yngri bróðurin hevði við sær, tá hann kom til landið 15. juli.

Sambært meðákærda var hetta peningur, sum hann hevði tikið við til landið, tí ætlandi skuldi hann keypa pizzariaið frá eldra bróðrinum, tí høvuðsákærda.

Men í hesum spurningi gerst málið eitt sindur gruggut, tí ákærdi hevði ilt við at sannføra ákæruvaldið um, hvaðani peningurin stavaði.

Í frágreiðing síni segði ákærdi, at peningurn stavaði frá sølu av tveimum íbúðum í Malmø. Onnur varð seld í 2005, hin í 2007.

Trupulleikin er bert tann, at sambært ákærda stóð Nordea í Svøríki fyri søluni, men Nordea sigur seg einki kenna til hesar sølur, og kravda innlitið í kontoavrit hjá ákærda vístu ongar bankaflytingar í hesum sambandi. Heldur ikki vístu kontoavritini, at ákærdi hevði tikið pening út, svarandi til nær námind 135.000 krónum, upp undir ferðina til Føroya. Í veruleikanum vístu kontoavritini ongar munandi transaktiónir yvirhøvur.

Ákærdi greiddi í hesum sambandi frá, at hann alt sítt lív hevði havt nógvan reiðan pening við hús, og at handlar í hansara umhvørvi púra vanliga fóru fram við reiðum gjaldi.

### Bíligar íbúðir

Í frágreiðing síni segði ákærdi eisini, at hóast hann ikki sum so fekk prógva søluna av íbúðunum, so kundi hann vísa á eina avgjaldsrokning frá svensku myndugleikunum í sambandi við søluna.

Talan var um eitt uppkrav áljóðandi 98.000 krónur, sum sambært ákærda svaraði til 22% av søluprísinum. Sambært hesum skuldu íbúðirnar tilsamans verið seldar fyri 445.500 krónur, ella smáar 223.000 krónur hvør. Og tað má sigast at vera bíligar íbúðir uttan mun til støddina, í einum slíkum stórbýi.

Ákærdi segði, at hann hevði tosað við svenska skattavaldið og gjørt avtalu við teir, um at útseta gjaldið av hesum avgjaldi til einaferð seinni.

Ákærin vildi vita, hví ákærdi ikki hevði boðað frá peninginum, tá hann kom til Føroya. Til hetta svaraði hann, at hann helt tað bert verða neyðugt tá hann fór úr einum landi.

Eisini vísti Linda Hesselberg á í proceduru síni, at peningurin í kuffertinum ikki var svenskur, men danskur. Hon helt, at tað kundi tykjast eitt sindur løgi at liggja inni við so nógvum donskum peningi, tá ákærdi búði í Svøríki.

Men søgan um peningakuffert endar ikki her. Ákærdi pástóð nevniliga, at hann hevði møtt teimum báðum órættaðu í floghavnini í Kastrup. Har skuldu teir hava havt hvør sítt kuffert við hvør sínum 200.000 krónum í. Ákærdi greiddi frá, at teir báðir órættaðu høvdu spurt hann, hvussu ein bar seg at við at veksla føroyskar og danskar seðlar um til evrur.

Hetta legði ákærdi út sum at teir báðir skuldu hvítvaska pening, sum teir høvdu nápað úr kassanum í pizzarianum.

Av einari ella aðrari orsøk valdi hvørki ákæruvaldið – sum eisini er væl skiljandi – ella verjarnir at leggja nakran serligan dent á hendan partin av frágreiðingini. Tí hetta kundi jú verið eitt motiv hjá órættaðu at uppfunnið drápshóttanina. Besta verja er jú sum kunnugt álop.

Umframt hesi trý pengakuffert – harav tað bert ber til at prógva tað eina – legði løgreglan hald á 12.800 krónur saman við einum kvittanarstrimli frá 17. juli, helst dagsins umsetningur hendan dagin í pizzarianum.



*Ákærdi hevði eitt kuffert við 135.000 krónum í reiðum peningi við sær til Føroya. Samstundis segði hann í vitnisfrágreiðing síni, at hann hevði hitt teir báðar órættaðu í Kastrup, hvør við sínum kufferti við 200.000 krónum í*

*Modellmynd*

# Stór skuld

**Undir sakarmálinum kom fram, at høvuðsákærdi hevur stóra skuld til tað almenna**

DRÁPSHÓTTAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Høvuðsákærdi persónurin í málinum um drápshóttan móti tveimum tunesarum, hevur búð í Føroyum í tilsamans 17 ár.

Meginpartin av tíðini hevur hann rikið eitt pizzaria, fyrst í Tórshavn og seinnu árini inni í Runavík.

Í 2001 og 2002 komu ávikavist ein systirsonur og ein bróðursonur til Føroya at arbeiða hjá honum sum pizzakokkar, og tað hava teir gjørt líka síðani.

Sambært vitnum hava viðurskiftini teirra millum altíð verið serstakliga góð, og høvuðsákærdi kallaði teir báðar fyri synir sínar. Eisini kom fram í rættinum, at høvuðsákærdi hevur bygt teimum báðum hús í Tunesia, sum hann hevur rindað fyri.

Viðurskiftini hava verið góð heilt fram til dagarnar mitt í juli, tá systir- og bróðursynirnir ákærdu pizzaeigaran fyri drápshóttan.

Hóast pizzariaið eftir øllum at døma hevði stóran umsetning, so gav fyritøkan undirskot. Nú sakarmálið var fyri, skyldaði høvuðsákærdi 805.000 krónur í skatti og fyritøka hansara 161.000 krónur, harav tær 158.000 eru MVG.

Hvussu pizzaeigarin kundi selja fyrit-kuna til bróður sín fyri tær 135.000 krónurnar, hesin hevði við til Føroya, kom ikki fram í rættinum. Hinvegin segði ætlaði keyparin, at um hann hevði vitað, at stór skuld var í fyritøkuni, hevði tað ikki komið upp á tal at keypt.